gult cyan magenta svart



# Í praktikk hjá Kára



*Lena Maria Ellingsgaard úr 9.a í Venjingarskúlanum í starvsvenjing sum listamálari*

*Mynd: Jens Kr.Vang*

*Birgir Kruse*

Seinastu tvær vikurnar hava næmingar í 9. flokkunum í Venjingarskúlanum verið í praktikk. Men ikki allir næmingar velja tey vanligu praktikkplássini á føroyska arbeiðsmarknaðinum.

Lena Maria Ellingsgaard úr a-flokkinum valdi at fara í praktikk hjá listamálaranum Kára Svensson. Hann hevur starvstovu – ateliér – í gomlu bommfabrikkini hjá Frants Restorff í Havn. Haðani er útsýnið frálíkt yvir býin og havnina.

Kári Svensson (f. 1954) hevur í løtuni framsýning í nýggju hølunum hjá Býráðnum, har sonevnda Snarskivan er. Talan er um nýggjar málningar, olja á lørift. Kári var millum tey fimm føroysku listafólkini, sum fyri jól sýndu fram í New York.

Áður hava Amariel Norðoy og Eyðun av Reyni havt framsýning við Snarskivuna. Kann henda, at Lena Maria verður ein av komandi framsýnarunum. Evnini hevur hon, litføgur og góð.

# Brennifløgur



*Mynd: Álvur Haraldsen*

*Birgir Kruse*

Talgild avrit eru ein brennandi spurningur í dagsins samfelag. Bæði fyri leik og lærd, málsliga eins og rættarliga.

Í nýggjasta brævinum frá málnevndini “Orðafar”, verður orðið brennifløga nevnt. Hetta snøgga orðið skal fevna um tað, sum á donskum nevnist “brændbar CD”.

Fílst verður – og tað av røttum – á, at danska orðið verður nýtt í føroyskum. Til dømis verður sagt í eini lýsing, at “tíggju brennbarar fløgur kunnu fáast fyri so og so nógvar krónur”. Í staðin verður skotið upp at siga “brennifløgur”. Snøgt og munnrætt.

Men um dagarnar mundi brenna nakað hart á í báðum telduborðum hjá einum dana á Vestursælandi.

Hann varð í vikuni ákærdur fyri at hava brent ikki færri enn 62.000 teldufløgur við ólógligum ritbúnaði. Teldutøki brennivargurin kann sum ongan ting vænta at fáa 630 milliónir í endurgjaldskravi frá teim fyritøkum, sum eiga telduforritini og –spølini, sum vórðu avritaði á teim mongu brennifløgunum.



**Nýggja Beatlesfløgan við teim góðu gomlu sangunum setir øll met í sølubúðunum. Og tað hóast 30 ár eru liðin síðani teir góvust at spæla. Samstundis er nýggja bókin ‘The Beatles Anthology’ eisini at fáa kring allan heim. Hetta er einasta bók, har allir beatlarnir hava verið við til at sett saman - Yoko Ono Lennon umboðar John Lennon. Í eini greinarøð fyri Sosialin fer Niclas Johannesen at viðgera bókina og fyribrigdi The Beatles.**




# Soleiðis vóru The Beatles

## - sambært teir sjálvar



*Niclas Johannesen*

Hon vigar meira enn seks pund. Inniheldur fleiri enn 1300 myndir og telur 340.000 orð. Og hon er skrivað ella útgivin, av the Beatles.

“The Beatles Anthology” er nú til sølu kring at kalla allan heim, og verður søgd at vera síðstu orðini frá - ið hvussu er frá John, Paul, George og Ringo - um tað, ið væl saktans kann kallast heimsumfatandi Beatles-hugtakið. Frammanundan vóru longu bíløgd 1,5 milliónir eintøk, og bókin verður í fyrstu syftu prentað á átta ymsum málum.

### Hundraðtals samrøður

George Harrison, Paul McCartney, Ringo Starr, og Yoko Ono Lennon hava brúkt farnu seks árini til at fullgera verkið. Savnað hava verið hundraðtals samrøður, sum John Lennon hevði við journalistar og onnur, áðrenn hann varð myrdur í 1980.

Haraftrat hevur Beatles produsarin George Martin eisini luttikið í arbeiðnum, aftrat fyrrverandi Beatles tíðindastjóranum Derek Taylor, sála, og núverandi stjóranum á Beatles fyritøkuni Apple Neil Aspinall.

The Beatles eru uttan samanbering mest viðgjørdi bólkurin nakrantíð. Í so máta er onki nýtt undir sólini í “The Beatles Anthology”, siga tey, ið hava lisið bókina. Men hetta er einasta verkið, har allir fýra limirnir geva sína egnu upplivingar av Beatles døgunum. Og stundum eru upplivingarnar hjá teimum fýra ikki í samsvari við hvørja aðra.

### Skrøggsøga

Ein av seigastu søgunum hevur verið, at The Beatles royktu marijuana á wc’inum á Buckingham Palace, beint áðrenn teir fingu handað MBE heiðurstek-ing frá drotningini. Tað er eisini soleiðis, at John Lennon minnist hendingina í “Anthology”. Men George Harrison vísir á, at hetta ikki er satt.

Vit royktu ongantíð marijuana á wc’inum. Tað, sum hendi var, at vit bíðaðu, inntil tað bleiv okkara tørn og vit vóru so fjáltursstungnir, at farið varð á wc’ið at bíða. Og har royktu vit eina sigarett - vit vóru allir roykjarar í teirri døgum. Eg eri vísur í, at John nøkur ár seinni hevur hugsað aftur og sagt, ‘á ja, vit fóru á wc’ið og royktu’ og harfrá bleiv tað til, at vit høvdu roykt marijuana. Men tað gjørdu vit ongantíð”, sigur George Harrison í bókini.

Ringo Starr er hinvegin minni sannførdur. “Eg eri ikki heilt vísur í, um vit royktu ein feita ella ikki. Tað var undir øllum umstøðum løgið at vera staddur á slottinum.

### 50 pund um vikuna

Ein onnur, kanska ikki so kend søga er, at teirra managari Brian Epstein fyrst í 60’unum bjóðaði teimum at fáa fasta løn restina av lívinum. 50 pund um vikuna! Hóast teir vóru fátækir um hetta mundið og ikki høvdu lagt heimin fyri teirra føtur, so vóru boðini til Epstein: “Nei, takk. Vit taka kjansin, Brian. Vit vilja risikera at tjena eitt sindur meira enn 50 pund um vikuna”, minnist George Harrison.

“The Beatles Anthology” kemur út meira enn tredivu ár aftan á dramatiska og beiska Beatles skilnaðin.